SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Transport, Infrastructure and Labour

**Fíggjarnevnd Løgtingsins**

Tórshavn, 27. novembur 2018
j. nr. S1304-015/18
Viðgjørt: AE

**Fíggjarlógaruppskotið fyri 2019, játtan til Akstovuna**

**17.38.4.01. Akstovan** (Rakstrarjáttan)
Akstovan hevur í fleiri ár, arbeitt við málinum um at framleiða eitt nýtt koyrikort, sum lýkur galdandi altjóða trygdarkrøv til koyrikort, sum ásett í ES reglugerð. Hetta fyri at føroyska koyrikortið framhaldandi kann varðveita sítt gildi til altjóða nýtslu.

Fíggjarmálaráðið lækkaði játtanina (hækkaði avlopskravið) til Akstovuna við 850 tús. kr. í sambandi við fíggarlógina fyri 2016. Játtanin varð ætlað sum ein árlig afturvendandi játtan til at framleiða nýggja koyrikortið, og síðan er einki játtað serstakt til nýggja koyrikortið.

Verandi føroyska koyrikortið lýkur ikki altjóða trygdarkrøv og altjóða viðurkenning og umbýti av koyrikortum uttanlands, sum hevur verið av føroyska koyrikortinum, fer í framtíðini ikki at vera góðtikið til nýtslu ella umbýti uttanlands. Harafturat er vandi fyri, at koyrikortið, sum er grundarlag undir ætlaða førarakortinum til føroyskar vinnuførarar, heldur ikki verður góðtikið av donskum myndugleikum til hetta endamál.

Mælt verður til at strika avlopskravið hjá Akstovuni, sum sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019 er 568 tús. kr., soleiðis at játtanin verður útreiðsluneutral.

Vinarliga

Heðin Mortensen
landsstýrismaður